

Í vánaligum koyrilíkindum:

# Fartelefonin gevur tryggleika

Vakthavandi sigur, at tá ið bilar verða fastir í kava, er mannagongdin soleiðis, at bilførarar, ið hava fartelefon, sjálvir ringja til løgregluna og boða frá hvar teir standa fastir. Løgreglan gevur síðani boðini víðari til antin Landsverk ella sløkkiliðið, sum síðani fara út at grava bilarnar leysar aftur.

Vakthavandi sigur, at tað tykist sum um fleiri fólk taka kjansin at koyra í vánaligum líkindum, nú fartelefonin er vorðin hvønnmansogn.

– Um fólk stóðu føst í kavanum fyri nøkrum árum síðani, so máttu tey bara vóna, at onkur gróv seg framá tey. Við fartelefonini hava tey nógv betri møguleikar at boða frá hvar tey eru, og at teimum tørvar hjálp, skuldi einhvør trupulleiki stungið seg upp. Síðani kunnu vit administrera tað soleiðis, at hjálpin kemur skjótast gjørligt, sigur vakthavandi.

**eys**

# 30-40 bilar fastir Millum Fjarða

Um 22 tíðina jólaaftan, tá veðrið versnaði norðanfyri, byrjaðu løgreglan at fáa fráboðanir um bilar, ið stóðu fastir í kavanum. Tað kavaði sera illa, nógvur vindur var, og fannirnar løgdu seg tí skjótt um vegirnar so ikki bar til at koyra.

Serliga báðumegin Norðskálatunnilin og Millum Fjarða var at kalla ógjørligt at koyra.

Vakthavandi sigur, at politiið um miðnáttarleitið fekk eina fráboðan frá Landsverk um, at einir 30-40 bilar stóðu fastir Millum Fjarða. Óvist er hvussu leingi teir stóðu til gravkúgvin kom fram á teir, men Landsverk fekk grivið teir so frætt leysar, at teir aftur fingu koyrt.

**eys**



*Ímillum kl. 22 og 01 jólaaftanskvøld hvødu kavaruddararnir út at gera við at hjálpa bilum sum vóru fastir í kavanum. Kl. 01 gav politiið boð um, at tað einans skuldi koyrast um tað var bráðneyðugt*

# Bilur fastur í Hósvík

Vakthavandi sigur, at hóast líkindini vóru vánaligast við Norðskálatunnilin og Millum Fjarða, so vóru stórar fannir á vegnum frá Hósvík og allanvegin norðureftir.

Politiið fekk seint jólaaftan eina fráboðan frá Landsverk um, at teir høvdu grivið seg framá ein bil, ið stóð fastur í kavanum í Hósvík. Eisini á Langasandi varð ein bilur funnin. Vakthavndi sigur, at tað komu ógvuliga nógvar fráboðanir um bilar, ið stóðu fastir á hesum strekkinum, og at teir tí um 01 tíðina, jólanátt, góvu boð um, at tað ikki mátti koyrast eftir landsvegunum, uttan tað var alneyðugt.



**eys**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 53, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin ikki sama týdning longur

MARKNAÐARRÁK

Marknaðurin ávirkast ikki so nógv av oljuprísinum longur. Í heyst hevði oljuprísurin, saman við gongdini á amerikanska arbeiðsmarknaðinum, alstóra ávirkan á fíggjarmarknaðirnar, men soleiðis er ikki longur. Eitt dømi upp á hetta sást í farnu viku, tá tøl fyri amerikansku oljugoymslurnar hækkaðu. Tá lækkaði oljuprísurin útvið 2 dollarar fyri tunnuna ella 4,5%, men tað hevði als onga ávirkan á lánsbrævarenturnar.

Farna vika varð merkt av, at tað ikki komu nøkur týðandi lyklatøl fyrr enn hósdagin. Tað hevði við sær, at lítið varð handlað, men eisini at teir størru handlarnir sum kortini vóru, fingu marknaðin at flyta seg hampuliga nógv báðar vegir. Soleiðis sveiggjaði danska 10-ára rentan umleið 0,10% báðar vegir, men endaði á umleið sama stigi sum hon byrjaði.

Hósdagin komu tó nøkur týðandi tøl, t.d. inntøkur, privat nýtsla, ordrar eftir varandi vørum og PCE deflatorin, sum er týdningarmesta prísvakstrartalið hjá amerikanska tjóðbankanum. Burtursæð frá ordrum eftir varandi vørum vóru tey øll meir ella minni sum væntað, og høvdu onga ávirkan á marknaðirnar.

Evru-dollara kursurin hevur enn nógv at siga á lánsbrævamarknaðunum. Av tí at evran styrknaði eitt sindur í farnu viku, frá 1,33 til 1,35, vóru lánsbrævarenturnar verðandi á lága stiginum. Íleggjarar eru enn ikki farnir at líta á, at amerikanska stjórnin veruliga fer at gera nakað við stóru undirskotini á gjaldsjavnanum. Til tað álitið kemur, eru líkindi fyri, at dollarin heldur áfram at vikna mótvegis evruni.

Hesa vikuna koma aftur fá lyklatøl. Brúkara- og vinnuálitistøl úr USA og tøl fyri týska ídnaðarframleiðslu verða tey einastu av týdningi. Kaupthing væntar ikki, at hesi tøl fara at flyta fíggjarmarknaðirnar av álvara, nú nýggjárið nærkast og nógvir íleggjarar sostatt ikki fremja fleiri íløgur í ár. Eftir at norðurlendsku partabrøvini lækkaðu í fyrru helvt av desembur, eru hesi hækkaði heilt fitt aftur, og nækast nú hægsta stiginum í ár. Samanumtikið hevur 2004 verið eitt gott partabrævaár (+23,8%), og útlitini fyri 2005 eru hampulig.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,47% | 0,02% |
| 5 ára lánsbræv | 3,02% | -0,01% |
| 10 ára lánsbræv | 3,75% | -0,03% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 285,8 | 2,5% |
| OMX, Svøríki | 741,2 | 0,8% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.947,5 | 1,4% |
| S&P 500, USA | 1.210,1 | 0,6% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,64 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 172,38 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 87,20 | 1,1% |
| Altjóða Vøkstur | 59,79 | -0,9% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 5,50 | -0,9% |
| EUR | 7,44 | 0,1% |
| GBP | 10,59 | -2,0% |
| NOK | 0,90 | -0,2% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru ítroknaðar í mun til fyri viku síðan.*